# Bringureyði, *Erithacus rubecula*, støðugur búfuglur í Føroyum


***Resume***

From being a common passage migrant in autumn and spring with a few Robins as winter visitors, the Robin (*Erithacus rubecula*) has become a regular breeding bird with at least 30 pairs.

It has been documented that he has bred three times in the past, but at the turn of the century he presumably bred in the plantations in Tórshavn and Hoydølum. Since then there has been a steady increase in numbers. Apart from spreading over the gardens in Tórshavn, Robins has been found to nest in several places around the islands.


Bringureyði hevur altíð verið vanligur ferðafuglur um várið og heystið. Nakrir fáir hava verið her í vetrarvist, og sera sjáldan hava teir átt.

Seinast í 1990'unum øktist talið av bringureyða í vetrarvist, og um aldarskiftið og beint eftir er sannlíkt, at hann átti í viðarlundunum í Havn og Hoydølum, um teir látandi steggjarnir eru eftirfarandi.

Síðan hava fleiri beinleiðis eygleiðingar og myndatøkur í Havn og uttan fyri Havnina av bringureyðum á reiðri og saman við nýfloygdum ungum staðfest, at bringureyði er vorðin ein støðugur búfuglur hjá okkum. Síðan hava teir spjatt seg frá viðarlundunum út í garðarnar hjá fólki í Havn og úti á bygd.

Í mars mánaða 2000 hoyrdi PM bringureyða láta fyrstu ferð í viðarlundini í Hoydølum, og bringureyði hevur støðugt verið har síðan í alsamt øktum tali bæði í mið- og niðaru Hoydølum.

12. mars 2002 vóru tveir bringureyðar í hornatøkum í Viðarlundini í Havn. Teir bardust um eitt ávíst pláss (territorie), um ein kann siga tað soleiðis (PM).

13. juni 2003 sást bringureyði við maðki í nevinum í Hoydølum (PM).

26. mai 2004 sá Bjarni Mikkelsen eitt par geva ungunum føði í einum garði í Gundadali. Eisini í 2004 hevði Pia Dam eitt par í sínum garði, sum fekk ungar.

27. mai 2004 leitaði eitt par av bringureyða eftir maðki á plenuni framman fyri skúlan í Hoydølum (PM).

Verulig ferð kom á í 2005 við m.a hesum eygleiðingum:

11. juni læt ein steggi í gamla kirkjugarðinum (JKJ).

12. juni fleyg ein við tilfari til reiðrið í viðarlundini í Hoydølum (PM).

2 steggjar lótu í Viðarlundini í Havn (JKJ).

19. juni hoyrdi Jan Kåre Ness 4 steggjar og sá ein nýfloygdan unga í Hoydølum.

29. juni tók Karl Thomsen í Syðrugøtu myndir av einum nýfloygdum unga í garðinum hjá sær.

Hetta summarið hevði Petur á Roykheyggi í Runavík tvey pør, sum áttu í garðinum hjá honum.

Veturin 2005/2006 vóru í øllum føri 20-30 pør, sum høvdu vetrarvist í Tórshavn, men eisini úti um landið var hann henda veturin. Millum jól og nýggjár sá Rodmund á Kelduni tríggjar í Sørvági, og seinast í februar hoyrdi Ole Wick tveir steggjar láta við sjúkrahúsið í Klaksvík.

Summarið 2006 vóru eygleiðingar av bringureyðum um alla Havnina, bústovnurin mettur til 25-30 pør, og burtur úr allari rúgvuni kunnu hesi nevnast:

Í allan mai mánaða hoyrdi Janus Hansen tveir látandi steggjar á Debessartrøð

21. mai sá og hoyrdi PM tveir látandi steggjar í Hoydølum

24. mai vóru, sambært Trónda Leivssyni, tvey pør við gamla minkagarðin í Hoydølum, og heima í garðinum hjá honum í Skraddaragøtu var eitt par við stórum ungum.

30. mai var Pia Dam óheppin, tá sniglaeiturið drap parið í garðinum hjá henni.

Í øllum mai og juni vóru látandi steggjar við gamla kirjugarðin sambært JKJ

6. juni hoyrdi JKJ 5 steggjar, sum lótu í Viðarlundini í Havn.

12. juni var eitt par við trimum eggum í garasjuni hjá Kemm Poulsen, Tórshavn, men kuldin seinni í mánaðinum gjørdi av við urtina, tí 21. juni vóru 5 deyðir ungar í reiðrinum.

16. juni hoyrdi Hans Eli Sivertsen 3-4 steggjar láta í viðarlundini við Hotel Føroyar.

9. juli eigur eitt par í einum pappírsposa, ið liggur útyvir eina uttandurahill hjá Elisabeth og Jógvan P. Háberg við Landavegin.

Samanumtikið er bústovnurin fleirfaldaður bara síðan 2000, og í Havn eru í øllum førum eini 30 pør, og tá hann eisini hevur spreitt seg út á bygdirnar, er stovnurin størri enn hesi 30 pørini í øllum Føroyum, so spennandi verður at fylgja hesum fugli framyvir.

*Jens-Kjeld Jensen &*
*Poul Magnussen*